Ársfrágreiðing 2012/2013

Aðalfundurin 2. mai 2013

Ársfrágreiðing 2012/2013

Bústaðarviðurskiftir
Í desember fekk MBF uppskot um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald til hoyringar. Endamálið við uppskotinum var, at bygging av leigubústøðum verður frítikin fyri MVG í eitt avmarkað tíðarskeið á fimm ár. Uppskotið leggur upp til, at í minsta lagi skal talan verða um tríggjar leigubústaðir í hvørjari byggiætlan, harav í minsta lagi 1 bústaður av hvørjum trimum skal verða atkomuligur og kunna nýtast av fólki í koyristóli.

Í Klaksvík og í Eysturoy er farið undir at byggja vardar íbúðir.

Almannaveitingar
Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk kom í gildi tann 1. Januar 2013. Av tí at lógin kom í gildi 1. Januar 2013, ber ikki til at siga, hvussu umfatandi broytingar, lógin kemur at hava við sær. Tað er ongin ivi um, at lógin leggur upp til nógvar góðar møguleikar fyri fólk, sum bera brek, men lógin hevur eisini nakað av avbjóðingum.

Ein stór broyting er, at veitingar broytast frá at vera tørvsmettar veitingar, til at verða bruttoveitingar, sum eru skattskyldugar.

Arbeiðsmarknaður
Ása Olsen er stýrislimur í Dugna. Skúlin við Áir er undir umvæling, og húsast næmingarnir í Nesvík, meðan umvælingin verður framd. Eitt stórt framstig er, at nú fær skúlin lyftu.
MBF arbeiðir nógv við, at fáa góðkent restarbeiðsførleikan hjá fólki sum bera brek ájavnt við vanligan arbeiðsførleika. Hetta er serliga galdandi fyri fólk, sum fáa lægstu ella meðal fyritíðarpensjón.

Miðnámsútbúgving
Komandi ár verður ein flokkur fyri næmingar sum hava autismu á studentaskúlanum í Hoydølum. Hetta er at fegnast um, og hevur MBF frætt, at 9 næmingar hava søkt um at sleppa í hendan flokkin til komandi skúlaár.

ST- sáttmálin
MBF kemur at gera eina skuggarapport saman við Danske Handikaporganisationer. Skuggarapportin skal lýsa hvussu Breksáttmálin verður hildin, hvat verður hildið, hvat verður ikki hildið, og hvat skal til fyri, at fáa broytt viðurskiftini.

Atkoma
Í samband við útbygging av farstøðini hjá Vága Floghavn, hava trupulleikar stungi seg upp, tí at ongin hevur kannað eftir, um umstøðurnar at sleppa úr og í flogførini fyri fólk, sum bera brek eru í lagi.
Nú er ein loysn funnin, í samband við flogførini, og verður ein bilur sum hevur lyftu keyptur til endamálið.

Í samband við, at Hagstovan gav út bóklingin " Øll telja við", vísa hagtøl, at bert umleið 28% av arbeiðsplássunum í Føroyum hava umstøður fyri, at hava fólk sum sita í koyristóli í arbeiði.
Enn eru ongi frambrot hend, tá talan er um at tulka og teksta sendingar í Sjónvarpinum. Heldur onki er gjørt fyri at gera sendingar við einføldum orðingum og tekstum, so at menningartarnað og lesiveik kunnu skilja tekstin.
MBF hevur verið á fundi við Almannamálaráðið fyri at fáa sett eina skrivitulkatænastu á stovn, eisini hevur MBF gjørt uppskot til reglugerð og virkisætlan, sum Almannamálaráðið skal arbeiða víðari við.

HNR og NHR
MBF er limur í HNR. Ráðið hevur tveir fundir um árið, ein um várið og ein um heystið. Í vár verður fundur í ráðnum, har ráðið skal viðgera støðuna viðvíkjandi umboðan í NHR ráðnum.
Á fundi í Keypmannahavn í oktober kom fram, at Norðurlandaráðið hevði ætlanir um at broyta NHR ráðið, á tann hátt, at ætlanin er, at framyvir skulu bert tvey umboð fyri allar tær norðurlendsku paraply organisatiónirnar hava umboðan í ráðnum. Restin av umboðunum skulu verða embætisfólk.

Limastøðan
Felagið Morbus Bechterev er strikað sum limur í MBF sambært ásetingunum í § 13 í viðtøkunum hjá MBF.

Starvsnevndin
Starvsnevndin hevur dagligu umsitingina av MBF um hendi og verða øll viðkomandi mál tikin upp til viðgerar har. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánan, tó undantikið juli og desember.
Á fundi tann 30. Mai 2012, skipaði starvsnevndin seg við Ruth Thomsen sum næstformanni.
Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan seinasta aðalfund eru:
Carita Bjørklund, forkvinna
Ruth Thomsen, form. Í Blindafelagnum, umboðandi Rørslubólkin, næstformaður
Jensa Heinesen, umboðandi medisinska bólkin
Sigrun Wardum, umboðandi sálarliga/neurologiska bólkin
Yvonna Hjaltalin, limur í Heilafelagnum, umboðandi Samskiftisbólkin (afasi)

Varaumboð hava verið:
Anna Dahl Olsen, frá Stoffskiftisfelagnum, Ásla Poulsen, frá Sinnisbata og Jógvan Sofus Vágsheyg, frá Heilafelagnum.

Skrivstovan
Carita Bjørklund hevur verið forkvinna í Meginfelag teirra brekaðu síðan seinasta aðalfund. Á skrivstovuni starvast Ása Olsen, sum er leiðari og Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk. Kirsten Vilhelmsen, sum hevur starvast sum reingerðingsfólk tey seinastu 19 árini, hevur sagt seg úr starvi orsaka av, at hon hevur fingið ein skaða í armin, sum førir við sær, at hon ikki fær gjørt reint. Fyri hana er Turid Thomsen sett fyribils sum reingerðingsfólk 7 tímar um vikuna.
Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá vanligari umsiting av Serflutningsskipanini og avlamisskeltum, hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum til fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymiskum slag. Men so vítt møguligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

Fíggjarviðurskiftir.
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2013 var 1,5 mill, harumframt hevur MBF fingið stovnsfæið úr Happadráttargrunninum, sum er 282.000 kr., sum er játtað til Verkætlanargrunnin. Við støði í lóg um ítróttarvedding, fær MBF nú tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2013 er enn ikki kunngjørd, men um støði verður tikið í 2012, hevði parturin hjá MBF verið umleið 500.000 kr. Hesin peningur kemur bæði MBF og limafeløgunum til góðar.

Býtislykilin.
Sambært viðtøkunum hjá MBF, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin.

Lógararbeiði.
MBF fær nógv lógaruppskot til hoyringar. Vit hava skipað lógararbeiðið soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, sum MBF fær til hoyringar, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava møguleika at gera sínar viðmerkingar. Í flestu førum eru tað ongi ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakrar viðmerkingar.
Frá 1. August 2012, hava vit havt 13 lógaruppskot til hoyringar. Harafturat hava vit verið á fundi í Trivnaðarnevndini, Almannamálaráðnum og Innlendismálaráðnum.

Formansfundir.
Á aðalfundinum hjá MBF, sum varð hildin tann 7. Mai 2005, vóru lógirnar broyttar. Innihaldið í viðtøkubroytingunum gekk m. a. út uppá, at teir 4 bólkarnir skuldu framyvir bert nýtast sum grundarlag, at velja starvsnevndarlimir eftir, soleiðis at allir 4 bólkarnir vórðu umboðaðir í starvsnevndini. Sum nakað nýtt legði uppskotið upp til, at halda fastar formansfundir í minsta lagi 2 ferðir um árið.
Formansfundur var tann 25. Oktober 2012, og tann 23. Januar 2013.

Onnur tiltøk.
MBF luttók á Fólkafundinum, sum var 21 til 22. September 2012, saman við hesum feløgum: Heilafelagið, Hjartafelagið, Alzheimerfelagið, Epileptikarafelagið, Lymfødemfelagið , Parkinsonfelagið og Javni.

Tann 1. November var limafundur í MBF húsinum, har ein norsk dama, sum skuldi luttaka til aðalfundin hjá Epileptikarafelagnum helt fyrilestur um, hvat limafeløgini sjálvi kunnu gera fyri, at fáa fleiri limir.

Tann 7. Februar 2013, var fyrilestur í MBF húsinum við Jegvan Bæk, har hann greiddi frá um tankafeltsteknik.

Tann 18. Mars skipaði MBF fyri pallborðsfundi í Miðlahúsinum, har lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk var viðgjørd. Fundurin var sera jaligur, og var nógv gott kjak um lógina. Av limafeløgum í MBF, luttóku umleið 7 feløg.

MBF blaðið
Í 2012 kom eitt blað út.
Blaðið snúði seg um fosturkanningar og nýggja bygnaðin á Almannaverkinum.
Tað er Rit & Rák við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið.

Eitt blað kemur út nú í vár. Stuðulin frá Tryggingarfelagnum Føroyar, sum var játtaður til 1 blað um árið gongur út nú, og verður tí stuðulin til tað eina blaði burtur.

Heimasíðan
Tað hevur stóran týdning, at hava eina aktiva heimasíðu. Tað er Diana Thomsen, sum umsitur heimasíðuna. Limafeløgini kunnu senda okkum boð um teirra fundir, sum vit so leggja út á heimasíðuna undir tiltøk.

Tænastur, Serflutningsskipan og Handikapskeltir.
MBF gevur tilmæli ella frámælir umsøkjarar sambært reglugerð um Serflutningsskipan Landsins. Endamálið við skipanini er at veita hjálp til fólk, ið bera brek og eru so darvað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól. Skipanin umfatar Klaksvík og allar kommunurnar í Eysturoyar og Sunda kommunu. Tilgongdin til skipanina er alsamt vaksandi.

MBF umsitur handikapskeltir. Umsóknir eftir handikapskeltum er vaksandi.

Enn er lógarverkið ikki komið uppá pláss soleiðis, at skeltini eisini kunnu nýtast í Danmark, men roknað verður við, at lógin verður klár í heyst.

Húsið
Í farna ári er Spastikarafelagið flutt út og er Felag fyri lesi- og skriviveik og Felag fyri hoyribrekað í Føroyum flutt inn aftur í hølini.

Húsið bleiv mála síðsta summar, og treingir taki nú til ábøtur.

Umboðan í Ráðum og nevndum
Ráðið fyri brekað.
Formaðurin í MBF. Sum varalim fyri hana situr Ása Olsen, leiðari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen frá Blindafelagnum og Óli Wolles frá Javna sum varaumboð.

Ljóðbøkur
Margreta Næs hevur sitið sum MBF umboð í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur.

Ráðið fyri ferðslutrygd.
Herit Joensen, Vestmanna situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

FUR- Føroya Ungdómsráð
MBF hevur tvey umboð í FUR. Umboðini hjá MBF eru Jákup Danielsen úr Nýrafelagnum og Ása Sunadóttir úr Epilektikarafelagnum.

Teknmálstulkatænastan
Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskifti millum teknmálsbrúkarar og hoyrandi.
Tann 11.08.2006 varð reglugerðin fyri Teknmálstulkatænastuna broytt so, at nú hava hesi umboðan í stýrinum fyri Teknmálstulkatænastuna: Eitt umboð fyri teknmálstulkar, eitt umboð fyri Deyvafelagið og eitt umboð fyri Almannamálaráðið. Umboðið fyri Deyvafelagið skal vera tulkabrúkari.
Ása Olsen, leiðari umboðar Almannamálaráðið í stýrinum.
Reglugerðin frá 2006 leggur ikki upp til nakran kassameistara, og hevur MBF ikki beinleiðis umboðan í stýrinum.

Serflutningsskipanin.
Ása Olsen, leiðari í MBF situr sum MBF umboð og skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin.
Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Marjun Holm, avvarðandi og skúlastjóri á skúlanum á Argja Hamri.